# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI KOMMUNUSKÚLAN



Ætlanin við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa økið við Kommunuskúlan til blandaða bústaða- og miðstaðabygging.

## § 1. ENDAMÁL

1.1 at skipa økið, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um til bygging innanfyri ásetingarnar um nýtslu í almennu byggisamtyktini.

## § 2. HEIMILD OG AVMARKING

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1.

2.3 Økið er uml. 7.000 $m^2$ til støddar (økið innanfyri reyðu avmarkingina í kortskjali 1) og liggur í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

2.4 Sambært kap. IV, §3 í almennu byggisamtyktini, er umráðisparturin 2. grundumráði lagdur til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Gjørligt

er at víkja frá ásetingum um byggistig, nýtslustig og mest loyvdu hædd í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt náttúrliga avmarkað øki. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara upp um 1,25.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Økið skal fatast sum ein eind, tó er loyvt at frábýta einstøku bygningarnar.

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.1 Mest loyvda byggistig fyri eindina sum heild 0,5

4.2 Mest loyvda nýtslustig fyri eindina sum heild 1,25

4.3 Mest loyvda hædd er 14 m til hægsta punkt við útvegg og 17 m til mønuna

4.4 Smærri bygningslutir sum altanir v.m. kunnu byggjast út úr bygniningunum

## § 5. PARKERING

5.1 Parkering verður skipa sum felags parkering fyri økið sum heild

## § 6. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

6.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

7.1 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

7.2 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 16/01032 |
| Ætlanarskriv: | 28/10-16 |
| Góðkent: | 26/10-16 |
| Váttað: | |




| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 16/01032 |
| Ætlanarskriv: | 28/10-16 |
| Góðkent: | 28/10-16 |
| Váttað: | [signature] |

| Tórshavnar Kommuna<br>Byggi- og býarskipanardeildin | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Heiti: | Serstøk byggisamtykt fyri Kommunuskúlan | | | | |
| Viðmerking: | Yvirlit | | | | |
| Skjal nummar: | 1. | Journal nr: | 16/01722 | | |
| Dagur: | 21.04.2016 | Mát: | | Tekna: | MKJ |
| Rættað: | | | | | |

HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

28. oktober 2016
**Mál**: 16/01032-8
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

*Góðkenningarskriv*

**Serstøk byggisamtykt fyri økið við Kommunuskúlan í Havn**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, hevur Tórshavnar kommuna í skrivi, dagfest 26. august 2016, sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið við Kommunuskúlan í Havn til góðkenningar.

Í sambandi við ætlanirnar um lestraríbúðir, innandura spælipláss, mentanarligt virksemi, listaverkstað, smærri vinnuligt virksemi o.a., hevur Tórshavnar kommuna gjørt uppskot til nýggja serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 339, í Tórshavn.

Uppskotið havur ligið alment frammi frá 27. juni til og við 18. juli 2016. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, 8. august 2016, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og hevur í ummæli sínum, dagfest 3. oktober 2016, mælt til, at serstaka byggisamtyktin fyri økið við Kommunuskúlan í Havn verður góðkend.

Sagt verður frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir, serstøku byggisamtyktina fyri økið við Kommunuskúlan í Havn.

Hjálagt rættað kortskjal og byggisamtyktartekstur við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo